# United-liðformaður skaddur

Tá ið Manchester United leygardagin vann ímóti Fulham í ensku steypakappingini, noyddist liðformaðurin Rio Ferdinand av gevast í hálvleikinum. Hann skeiklaði fótin, og nú er ivasamt, um Ferdinan verður tøkur til dystin ímóti Inter í Champions League. Um Ferdinand ikki fær spælt, fara Nemanja Vidic og Johnny Evans helst at manna miðverjuna hjá United.




# Hutton við at koma fyri seg

Fyri einum ári síðani keypti Tottenham skotska bakkin Alan Hutton fyri eina stóra upphædd, men seinastu mánaðirnar hevur skotin sitið uttanfyri við skaða. Nú er Hutton við at koma fyri seg aftur. Hann hevur vant seinastu tvær vikurnar, og sambært venjaranum hjá Tottenham, Harry Redknapp, nærkast hann einum plássi á liðnum.

# Barcelona økti aftur um munin

**Barcelona vann á Athletic Bilbao, meðan Real Madrid bert fekk javnleik ímóti lokala kappingarneytanum, Atletico Madrid**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Seinnu vikurnar hevur gingið illa í hond hjá Barcelona, sum hevur tapt ímóti bæði Espanyol og Atletico Madrid síðstu tvey umførini. Ímóti Atletico Madrid á Vicente Calderón Leikvøllinum í Madrid var reint galið. Barcelona var á odda 2-0, men endin var, at Atletico Madrid vann 4-3.

Men leygarkvøldið kom tann stolta, katalanska fótbóltsskútan aftur á beint. Samstundis hevur Real Madrid vunnið 2-0 á Espanyol og 6-1 á Real Betis. Munurin, sum Barcelona hevði upp á 10 stig, var knappliga tódnaður niður í fýra stig. Men um vikuskiftið øktist munurin aftur.




*Diego Forlan leggur Atletico á odda 1-0 og Real Madrid-málverjanum Iker Casillas er prísgivin*

*Mynd: Philippe Desmazes/Scanpix*

## Undanfrumframførsla

Á Nou Camp-leikvøllinum í Barcelona møttust FC Barcelona og Athletic Bilbao til eina undanframførslu til finaluna í sponsku steypakappingini, Copa Del Rey, sum júst hesi bæði liðini spældu seg í farna mikukvøld.

Barcelona vann dystin 2-0, men baskiska útiliðið hevði annars tann fyrsta stóra málmøguleikan í dystinum. Sergi Busquets stútaði Barcelona fram um 1-0, tá 17 minuttir vóru spældir. Hetta hendi aftan á eitt gott fríspark frá Xavi.

Í seinna hálvleiki staðfesti Lionel Messi sigurin við einum brotssparksmáli, sum argentinska superstjørnan setti ósvikaliga trygt í netið. Samuel Eto'o brendi nakrar risamøguleikar, og burdi Barcelona fingið ein størri sigur. Men 2-0 sigurin gjørdist søtur, tá úrslitið frættist frá Barnabeu-leikvøllinum í Madrid.

## Real misti

Í grannauppgerðini ímóti Atletico Madrid eydnaðist tað bert Real Madrid at fáa javnleik 1-1 ímóti teimum lokalu kappingarneytunum, sum hava havt eitt av sínum betri kappingarárum.

Sjey minuttir áðrenn steðgin hevði Atletico eitt mynsturálop, sum var byrjað frá egnari leikhálvu. Bólturin endaði hjá Sergio Agüero, sum sendi bóltin inn til Diego Forlán, sum var komin inn í brotsteigin. Framherjin úr Uruguay gjørdi einki mistak, men bankaði bóltin í netmeskarnar hjá Iker Casillas.

12 minuttir inn í seinna hálvleik javnaði hollendski spælarin, Klaas Jan Huntelaar, aftan á eitt frálíkt forarbeiði frá Gonzalo Higuaín. Úrslitið var tó langt frá nøktandi fyri Real Madrid, sum nú er seks stig aftan fyri Barcelona.

Kortini var tað Atletico Madrid, sum hevði teir størstu málmøguleikarnar í seinna hálvleiki. Iker Casillas var fullkomiliga seldur, tá Diego Forlan meddaði bóltin í stongina.

## Sera undirhaldandi

Talan var um ein sera undirhaldandi dyst við nógvum málmøguleikum, men tað er ikki at siga ov nógv, um hugt verður eftir stigatalvuni, at Barcelona var vinnarin av dystinum millum Real og Atletico. Barcelona hevur 63 stig, meðan Real Madrid hevur 57 stig, og enn eru 12 dystir og 36 stig at spæla um.

Týskvøldið skal Real Madrid spæla ímóti Liverpool á Anfield Road í seinnu áttandapartsfinaluni í Champions League. Liverpool vann 1-0 í Madrid, so har stendur á gomlum nøglum hjá Real Madrid. Barcelona tekur ímóti Lyon og hevur ein 1-1 javnleik frá fyrra dystinum sum gott útgangsstøði.

# Mourinho vil venja Manchester United

**Portugisiski venjarin heldur tað vera sjálvsagt, at hann gerst venjari hjá Manchester United, tá Alex Ferguson leggur frá sær.**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Venjarin hjá Inter Milan, José Mourinho, viðgongur, at tað hevði freistað hann at sloppið at starvast í Onglandi aftur. Fremst á ynskilistanum hjá Mourinho er at gerast venjari hjá Manchester United.

– Tá Alex Ferguson fer frá, fer Manchester United at leita eftir teimum bestu venjarunum í heiminum. Eg felli inn í ta kategoriina, sigur Mourinho við enskar fjølmiðlar.

Og tað er neyvan heldur nakað dulsmál, at ensku fjølmiðlarnir hava saknað tann litríka portugisiska venjaran, síðani hann varð koyrdur úr starvi sum venjari hjá Chelsea á heysti í 2007.

## Er ikki í iva

Mourinho er ikki í iva um, at hann er væl egnaður til venjarastarvið. – Eg kann so ikki útihýsa, at eg ein dag gerist høvuðsvenjari hjá Manchester United. Serstøk fótbóltsfeløg hava tørv á serstøkum venjarum, sigur Mourinho, sum gongur undir navninum »The Special One«.

Tað hevur gingist væl hjá Mourinho í italsku Seriu A. Inter er klárt á odda, sjey stig framman fyri Juventus. Mourinho vil kortini ikki lova, at hann verður venjari hjá Inter komandi kappingarár.

– Um 86 dagar fari eg í feriu. Verði eg framvegis venjari hjá Inter? Í fótbólti veit ein ongantíð, staðfestir tann ógvuliga serstaki José Mourinho.

Mikukvøldið spæla Manchester United og Inter seinna dystin í áttandapartsfinaluni í Champions League á Old Trafford í Manchester. Fyrri dysturin á San Siro í Milano endaði 0-0




*José Mourinho vil fegin sleppa aftur til Onglands – og helst vil hann verða venjari hjá Manchester United…*